# STÓRU SKÚLARNIR BETALA PRÍSIN

**FÓLKASKÚLIN** Tað eru teir stóru skúlarnir, sum betala prísin fyri ábyrgdarleysu framferðina hjá politikarunum, sigur Magnus Tausen, formaður í Lærarafelagnum

Áki Bertholdsen



**SKÚLI Í FRÍUM FALLI**

*Magnus Tausen, formaður í Lærarafelagnum, heldur, at gera politikarar onki er fólkaskúlin í fríum falli*

- Sum støðan er nú, kunnu vit ikki varðveita ein fólkaskúla á nóg høgum støði.

Tað staðfestir Magnus Tausen, formaður í Lærarafelagnum.

Sum vit skrivaðu í Sosialinum í gjár, verða fleiri av teimum smáu bygdaskúlunum niðurlagdir í summar, antin tí at ongi børn eru ella tí at foreldur heldur vilja hava børnini at ganga í størri skúlar.

Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum hevur roynt at nýskipa fólkaskúlan við at leggja smáar skúlar niður og leggja skúlar saman í størri eindir fyri at gagnýta játtanina betri.

Hennara endamál var, at peningurin, sum verður spardur, skal verða verandi í skúlaskipanini og sostatt koma skúlaverkinum til góðar.

Men hesum tekur stórur partur av samgonguni ikki undir við og úrslitið er, at longu í ár verða eini 50 lærarastørv spard burtur.

Eisini tað, at smáskúlar verða niðurlagdir í summar, verður brúkt sum eitt sparitiltak.

- Tað vera teir stóru skúlarnir, sum koma at betala prísin fyri hetta, tí hjá teimum smáu skúlunum er onki at taka av, staðfestir Magnus Tausen.

### Pengar á borðið

Hann harmast um, at samgongan skeyt ætlanina hjá landsstýriskvinnuni um eina nýskipan, í senk.

Hann torir illa at hugsa sær, hvussu støðan verður næsta ár.

- Siga vit, at ávís lønarhækking verður í heyst og at kostnaðarstøðið annars hækkar eitt sindur við starvsaldrum, eftirlønum o.s.fr., verður gloppið ímillum tørvin og játtaðu upphæddina upp aftur størri enn tað er í dag

Hann leggur dent á, at skulu vit halda fast við tann skúlabygnað, vit hava, skulu pengar á borðið.

Tað er prísurin fyri at varðveita bygdaskúlarnar og hesi almennu arbeiðsplássini kring landið.

- Tað, sum politikarar nú skulu gera upp við seg sjálvar, er, um teir vilja betala fyri skúlabygnaðin, vit hava, hóast tað er rættiliga dýrt.

- Vilja teir ikki tað, verða teir noyddir at broyta bygnaðin og skera nakrar av teimum smáu skúlarnar burtur fyri at fáa meiri fyri pengarnar.

- Tað er ongin millumvegur, leggur hann afturat.

Formaðurin í Lærarafelagnum sigur, at støðan, sum skúlin kemur í longu í summar, er ein vanlukka og heldur hetta fram á, fer skúlin ordiliga í knús.

- Hetta er ikki ein spurningur um fakfelagspolitikk ella um skúlabygnað. Hetta er ein spurningur um at vit, sum framkomið samfelag, vilja hava ein skúlaskap á nóg høgum støði, sigur Magnus Tausen.

*aki@sosialurin.fo*

# Eldur í hús á Tvøroyri

**ELDUR** Tíðliga í morgun kom eldur í eini sethús á Tvøroyri



**ELDUR**

*Eldurin var ikki stórur, men húsini hava fingið stóran skaða av royki*

Tað var klokkan 8.56, at løgreglan fekk fráboðan um, at eldurin var í læknahúsunum í Sjúkrahúsbrekkuni á Tvøroyri, sigur Jaspur Vang, økispolitileiðari í Suðuroy.

Sløkkiliðið og løgregla vóru skjót á staðnum og fekk bast eldinum áðrenn hann gjørdi nakað serligt av skaða.

Tað tók ein góðan hálvan tíma at basa eldinum og fáa tamarhald á støðuni.

Men hóast sjálvur eldurin ikki gjørdi so nógv um seg, stóðst rættiliga nógvur roykur av ehonum. Sostatt eru húsini eru illa merkt av tí, tí roykskaðin er umfatandi.

Oddur Dimon, sløkkiliðsleiðari, sigur, at eldurin kyknaði í eymhettuni og fór nakað upp eftir, men hvør orsøkin var, dugir hann ikki at siga.